VINNU SÍÐURNAR

Nr. 37 • mikudagur • 23. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroyar krøkt seg av altjóða samfelagnum



*– Allar Føroyar hava eitt suðuroyarsyndrom. Vit ásanna ikki tann veruliga trupulleikan og verða so líðandi avskorin frá umheiminum, sigur Óli Samró*

**– Heimurin klárar seg saktans uttan 48.000 føroyingar og eini 100.000 tons av upsa og øðrum botnfiski. Men Føroyar kunna ikki klára seg uttan at vera ein partur av heimsbúskapinum, sigur Óli Samró**

FISKIVINNUKREPPA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg skilji ikki kjakið í Føroyum um trupulleikarnar í fiskivinnuni.

Óli Samró, búskaparfrøðingur, heldur, at skal fiskivinnan í Føroyum fóta sær aftur, skal nógv meiri til, enn tað, sum kjakið nú snýr seg um.

– Trupulleikin, sum vit hava at dragast við nú, er, at Føroyar eru óálítandi at keypa frá. Men veruleikin er, at føroyingar eru krøkt seg sjálvar av í alheimsgerðini.

Fá hava sum Óli Samró fylgt við gongdini í føroysku og altjóða fiskivinnuni. Hann hevur arbeitt við búskapi í føroyskari og í altjóða fiskivinnu í 15 ár. Samstundis hevur hann í fleiri ár verið formaður í fiskidaganevndini og limur í formansskapinum í búskaparráðnum.

Hesi seinastu tvey árini hevur hann arbeitt í Haag í Niðurlondum.

Vit hava spurt hann, hvat hann heldur skal til fyri at fáa fiskivinnuna í føroyum á føtur aftur.

Hann heldur, at kjakið um føroyska fiskivinnu í løtuni kemur ikki at føra langt.

– Kjakið snýr seg at kalla bara um smálutir í fiskivinnuni, har tað ikki er sjálv sjúkan, sum verður viðgjørd, men einans sjúkueyðkennini.

Kjakast verður um flakavirkini í Vági og í Hvalba, um at støddarskilja fisk og um betri flutningsamband til Skotlands. Tað verður enntá at kjakast um at tvinga fisk um eina uppboðssølu.

– Tað er avgjørt positivt, at løgmaður hevur sett sær eina 15 ára langtíðarætlan fyri framtíð Føroya. Men tað er í stórari andsøgn við hesi langtíðarmál, at landsstýrismenninir í fíggjarmálum og fiskivinnumálum sita og viðgera rakstrarstuðul til fiskivinnuna við at umhugsa at lata stuðul til rækjuvinnuna.

– Øll orka verður løgd at kjakast um smálutir sum hesar og tað er heilt burturvið. Øll politisk orka verður løgd at stýra fiskivinnuni niður í smálutir, tí atlit skulu takast fyri øllum møguligum, bæði fyri arbeiðsloysi, økismenning og øðrum.

Sostatt heldur búskaparfrøðingurin, at hóast dúgliga verður kjakast, verður ongantíð komið inn á sjálva kjarnina í trupulleikanum.

– Men skal nakað spyrjast burturúr, verða vit noydd til at kalla ein spaka fyri ein spaka. Og veruligi trupulleikin er, at føroyingar klára seg ikki í altjóða handilsvinnuni. Men ístaðin fyri at viðgera tann spurningin, tosa vit um at støddarskilja hýsu, sum um tað var ein trupulleiki, sum galt lív ella deyða.

– Vit vilja fegnir hava tamarhald á einum hóttandi ruðuleika við at stýra fiskivinnuni heilt niður í smálutir. Í veruleikanum er avleiðingin, at ruðuleikin verður bara størri og størri.

Hinvegin verða teir grundleggjandi og veruligi trupulleikarnir valla tiknir upp á tungu.

### Fiskvinnan snýr seg um "business"

Óli Samró sigur, at fyrsta treyt fyri at koma víðari er,